

# Dansur í mentanarvikuni

**Kendir tónleikarar spæla til dansin í ítróttarhøllini í Runavík**

Leygarkvøldið í mentarvikuni í Runavík verður dansur í ítróttarhøllini í Runavík, og tað hevur eydnast teimum at fáa nakrar avmætastu tónleikarunum í landinum at spæla.

Har verða at hoyra Eyðun, Terji, Jens Marni og Kim.

Dansurin byrjar á midnátt og heldur á til klokkan fýra sunnumorgunin.





# Framsýning um skiparaskúlan

**Bygdasavnið Forni hevur framsýning allar dagarnar í mentanarvikuni í Runavík**

MENTAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Framsýningin hjá Bygdasavninum Forni hevur eina serliga framsýning í mentanarvikuni.

Framsýningin er um skiparaskúlan, sum fyri meira enn hundrað árum síðan byrjaði í á Glyvrum.

Poul Nicolaj Danielsen byrjaði skúlan í 1890-árunum, og Hans Djurholm tók skúlan eftir hann.

Eisini hevur Forni fingið eitt modell av "Guiding Star" sum Mourits Niclassen á Glyvrum átti.

Opið er alla mentunarvikuna frá 16.00 til 18.00

# List og kvirra í

**Fríggjakvøldið letur Heðin Kambsdal upp málningaframsýning í Glyvra kirkju, nú 200 ár eru liðin, síðan tónaskaldið Mendelssohn er borið í heim. Trý kvøld verða í næstu viku í kirkjuni við heitinum list og kvirra,og mentanarvikan endar sunnukvøldið við sangkvøldi í kirkjuni**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eitt nýtt tiltak fer av barkastokki í Glyvra kirkju fríggjakvøldið klokkan 20.

Tiltakið hevur yvirskriftina myndlist og tónleikur, sum fara at eyðkenna alt kvøldið í kirkjuni.

Hetta kvøldið letur Heðin Kambsdal, listamaður og útbúgvin urguleikari upp málningaframsýning í forkirkjuni, og Heðin Kambsdal fer eisini i kirkjuni at spæla yndisligan og vakran urgutónleik eftir Mendelssohn, sum varð føddur fyri 200 árum síðan.

Oggi Lamhauge, listamáður hevur átikið sær at siga nøkur orð um listina



# Listaframsýning í grafiska

**Oggi Lamhauge og Beinta Hansen hava framsýning í grafiska verkstaðnum hjá Oggi í Søldarfirði í mentanarvikuni í Runavík**

MENTAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Grafiski verkstaðurin í Søldarfirði heldur til í gamla handlinum hjá Lenu og Sámal Jákup Lamhauge, og har hevur Oggi Lamhauge arbeitt seinastu trý árini.

Verkstaðurin, sum er 60 fermetrar, hevur steinprent- og koparprentpressur. Eisini er eitt stórt alrúm, sum kann nýtast til framsýningar, undirvísing o.a.

Oggi Lamhauge tók útbúgving sum listgrafikari við lærda háskúlan í Íslandi í 1997. Kendasta verk hansara er uttan iva altartalvan í Hattarvíkar kirkju. Oggi hevur eisini gjørt fleiri steinprent fyri stovnar og virki, og hann hevur undirvíst børnum, ungum, vaksnum og menningartarnaðum í tekning, máling og grafikki. Oggi fekk trý ára starvsløn frá Mentanargrunni Landsins í 2006. Oggi arbeiðir við samtíðarlist við trúarligum symbolum.

Beinta Hansen, sum eins og Oggi Lamhauge er úr Søldarfirði. Hon hevur verið virkin í listarliga økinm í nøkur ár. Hon er sjálvlærd, men hevur lært grafikk á kvøldskúlanum í Havn. Beinta Hansen hevur eisini áður sýnt frm í mentanarvikum. Annars er hon sjúkrarøktarfrøðingur. Beinta Hansen fer væntandi at brúka verkstaðin komandi tíðina.

Framsýningin í grafiska verkstaðnum verður opin hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið í næstu viku frá kl. 18 til 20. Tá ið framsýningin letur upp hóskvøldið, fara Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrison at syngja og spæla.

